Tórshavn 01. juli 2018

Til Argja Róðrarfelag og Hósvíkar Róðrarfelag.

Dómsnevndin hjá Róðrarsambandi Føroya hevur á fundi í dag viðgjørt kærurnar frá Argja Róðrarfelag og Hósvíkar Róðrarfelag, um avgerðina hjá nevndini í Róðrarsambandi Føroya, um at róðurin hjá 5-mannaførum hjá gentum á Eystanstevnuni 16. juni 2018, skuldi rógvast umaftur.

Í samband við viðgerðina hevur dómsnevndin brúkt viðkomandi tilfar í málinum, havt samtalur og nýtt viðkomandi lógir og reglugerðir.

Vísandi til grein 9 punkt 2 í reglur fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum, metir dómsnevndin seg ikki hava heimild til at broyta meting dómarans í kapping. Dómsnevndin kemur tí til ta niðurstøðu, at Argja Róðrarfelag og Hósvíkar Róðrarfelag fáa viðhald í kæruni. Dómsnevndin kemur tí somuleiðis til ta niðurstøðu, at úrslitið av róðrinum hjá 5-mannaførum hjá gentum á Eystanstevnu stendur við.

Úrskurðurin hjá dómsnevndini kann, smb. Grein 4, undir kærir, av pørtunum kærast til Ítróttardómstólin, og skal hetta verða gjørt í seinasta lagi sjey samdøgur eftir, at partarnir hava fingið kunnleika um úrskurðin.

Við róðrarkvøðu

Vegna Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya

Hans David Hansen, formaður